# Rene skal verja EB/-Streymamálið



Tað verður Rene Tórgarð, sum skal loysa tann nú skadda Gunnar á Steig av í málinum hjá EB/Streymi.

Avtala er gjørd millum partarnar, og longu um vikuskiftið verður Rene partur av liðnum hjá EB/Streymi, sum tá skal royna seg móti HB í Gundadali.

Og tað kann væl vísa seg, at EB/Streymur við hesum hevur fingið ein sera góðan málverjan at loysa Gunnar av.

Rene var á yngru árum fastur partur av føroysku ungdómslandsliðunum í fótbólti, men í vaksnu røðunum hevur hann tó ikki verið so nógv at sæð. Partvíst hava skaðar forðað fyri hesum, men helst hevur tað eisini spælt inn, at hann fyri tað nógva hevur verið roknaður sum annar málverji hjá B36. Eisini hóast tað gjøgnum árini er blivin talan um nakrar dystir til samans á besta liðnum.

- Tað verður sjálvandi meira spennandi, nú eg kann síggja fram til fasta spælitíð í bestu deildini. Og í øllum førum er hetta ein avbjóðing, sum eg gleði meg til, sigur Rene Tórgarð.

-jm

# Dramatikkur í fyrstu súkklukappingini í ár

**Tað kundi enda heilt galið tá ein bilur viltist inn á økið, har kappsúkklað varð leygardagin í Kladsvík**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*



*Við at skifta hjólið kundi Gunnar Dahl Olsen halda fram eftir óhappið, sum tíbetur ikki var so álvarsligt*
*Mynd: Bárður*

Kappast varð í Býarkoyring í Klaksvík leygardagin. Vaksin og unglingar koyrdu í 45 minuttir pluss eitt umfar. Børnini koyrdu millum tvey og fýra umfør runt á økinum Biskupsstøðgøta, Skúlavegur, Gerðagøta, Vágstún.

Stórur spenningur var undan kappingini millum vaksnu súkklararnar, nú menn hava vant so nógv upp undir Oyggjaleikirnar, sum byrja um ein góðan mánað.

Men tá koyrt hevði verið í 20 minuttir viltist ein bilur inn á økið har kappsúkklað varð, og sjálvandi tá óhappið er úti, so er vilsti bilurin júst í svinginum tá súkklararnir koma um svingið Biskupstøðgøta/Skúlavegum. Bæði Eli Christiansen og Gunnar Dahl-Olsen fara niður í asfaltið. Til alla lukku hendi ongin mannaskaði, men súkklan hjá Eli fór so mikið illa, at hugsingur var ikki um at halda fram. Við at skifta forhjulið kundi Gunnar løtu seinni halda fram. Hóast spenningurin ikki var hin sami eftir óhappið, so bleiv kortini kappast um 1. plássið, ið Gunnar fór við.

Hjá unglingum vann Torkil Veyhe tryggan sigur, og so væl gekk, at hann eisini kom á mál góðan minutt frammanfyri landsliðssúkklaran Esmar Joensen.

Næsta kappingin verður á Sundalagsstevnuni. Kappingin verður fríggjakvøldið 17. juni kl. 19.00, tá kappast verður í Einkultstarti. Kappingin er bert fyri unglingar og vaksin.

## Úrslit

**Bólkur I, gentir:**
1. Jónvør Olsen
2. Ronja Eysturdal
3. Jónvá Joensen

**Bólkur III, gentir:**
1. Una Joensen

**Bólkur I, dreingir:**
1. Dan Akursmørk
2. Tóri Nielsen
3. Fróði Mørkøre
4. Martin Olsen

**Bólkur II, dreingir:**
1. Kári V. Olsen
2. David Langaard
3. Jóanis Albert Nielsen
4. Jónsvein Joensen

**Bólkur III, dreingir:**
1. Niels Christiansen

**Úrslit, unglingar:**
1. Torkil Veyhe
2. Sigmund Olsson

**Bólkur I, menn:**
1. Gunnar Dahl-Olsen
2. Esmar Joensen
3. Eli Christiansen, útgingin

# Kastararnir eru um at koma í snúningar

**Kastarnir hava vant málvíst fram móti komandi oyggjaleikum í skjótt tvey ár, og nú byrja úrslitini at koma**

FYRIREIKINGAR
*tíðindaskriv*

Í løtuni verður skipa fyri einari kapping í hvørjari kastigrein um vikuna, og úrslitið kom longu í fyrstu kapping tá Heini Hátún tók 8 ára gamla metið í Kúlustoyt hjá Hera Ziska. Heini stoytti kúluna út á 13,38 m, og er tað 18 cm longur enn gamla metið hjá Hera. Heri setti sítt met í finaluni á oyggjaleikunum á Jersey í 1997. Tá rakk tað til eitt bronsumerki, so stuttligt verður at síggja, hvussu langt Heini kemur hesaferð. Serliga tá hugsa verður um, at hann til upphiting stoytti kúluna út á 13,68 m, hetta telur tó ikki við tí tað var uttanfyri kappingina.

Randi Kúrberg hevur higartil í ár betra um sítt persónliga met í hamarkasti við ikki minni enn 3,78 m, soleiðis at tað nú er 33,79 m, og bara lítlan metur aftanfyri føroyska metið hjá Ingibjørg Poulsen. Í spjótkasti er Randi stabil omanfyri 30 m, og er longsta kast í kapping higartil í ár 31,00 m. Tað er meir enn ein metur longur, enn hon kastaði á seinastu oyggjaleikum, tá hon gjørdist nummar 8.

Røgvi Højgaard hevur eisini sett persónligt met í spjótkasti við 47,93 m, og venjingin bendur á, at har er meir í væntu.

Hjá Hera Ziska gongur í løtuni meira striltið við at fáa góð úrslit í løtuni, men tað er ikki eitt ókent fyribrigdi. Tað er ofta so, at hann kastar í styttra lagi áðrenn oyggjaleikir, fyri síðan at kasta væl á leikunum. Seinastu tveir leikirnar hevur hann sostatt kasta góðar 2 m longur á leikunum, enn hann hevur gjørt til venjing undan leikunum, og um tað er aftur hesaferð, so verður hann enn einaferð við í stríðnum um heiðursmerkini.

# NSÍ leigar Páll

Ungi HB-framherjin, Páll M. Joensen, fer í næstum at gera ein leigusáttmála við NSÍ. Hetta váttar HB-venjarin, Heine Fernandez:

- Enn er tað ikki 100 prosent komið upp á pláss, men vit hava gjørt eina avtalu um, at NSÍ leigar Páll ein mánað í senn, greiðir Heine Fernandez frá.

Danski venjarin hjá HB sigur, at Páll hevur havt tað trupult við at vinna sær pláss á liðnum hjá HB, og við at leiga hann út til runavíkingar, kann Páll fáa eitt sindur av dystarvenjing í bestu deildini, og harvið gerast betur, sigur Heine Fernandez.

Tó sigur Heine Fernandez, at tað er ógvuliga sannlíkt, at Páll aftur verður at síggja í HB-troyggjuni seinni í ár.

Somuleiðis rósar HB-venjarin runavíkingum fyri at venda sær til eitt føroyskt felag fyri at leiga ein ungan føroyskan spælara, heldur enn sum so mong onnur at brúka eina rúgvu av pengum upp á ein ella annan tilvildarligan útlendskan spælara.

**tn**

# Robinson í Klaksvík



*Allan Joensen loysir nú Símun Gullaksen av sum ábyrgdarpersónur fyri fótbóltinum í Klaksvík*
*Mynd: Norðlýsið*

Tey, sum plaga at fylgja við sonevndu reality-sendingunum á útlendskum sjónvarpsrásum, royna ofta at hava fingurin á pulsinum, tá gitt verður um, hvør næsti persónurin verður, ið skal stemmast heim.

Í Klaksvík tykjast tey tó hava sína egnu útgávu av t.d. Robinson-ekspeditiónini. Fyrst var tað Ove Flindt Bjerg, venjari, sum varð sendur heim. Stutt eftir boðaði táverandi formaðurin, Gestur Hovgaard, frá, at hann nú eisini tók seg úr nevndini. Og nú er triði persónurin innan stutta tíð farin úr KÍ-toppinum.

Hesa ferð er tað Símun Gullaksen, ið annars hevur virkað sum formaður í fótbóltsdeildini hjá KÍ.

- Tað er rætt, at Símun er farin frá. Hetta hevur hann sjálvur biðið um, nú hann í løtuni ikki sær seg føran fyri røkja tær skyldur, sum hann hevur í nevndararbeiðinum, sigur John William Joensen, sum er kunningarleiðari hjá KÍ.

Hesum hevur nvndin nú eftirlíka, og ístaðin er Allan Joensen nú settur sum leiðari av fótbóltsdeildini.

Allan er annars einamest kendur frá sínum leikluti á vøllinum, har hann í drúgt áramál varð roknaður sum kanska størsta talentið í føroyskum fótbólti. Nakrar A-landsdystir gjørdist talan eisini um, men skaðar í ólukkumát forðaðu fyri eini støðugari tilveru í hesum.

Fleiri ferðir hevur Allan eisini roynt at vunnið sær pláss aftur á besta KÍ-liðnum, og seint sum fyri 10 døgum var hann við, tá KÍ spældi móti EB/-Streymi, men sum ikki einaferð, so varð hann eisini skaddur ta ferðina.